Tórshavn, 19. august 2021

Eysturkommuna
att.: Erik Lervig, kommunustjóri.

C.c.: Brandur Jacobsen, formaður í Víkingi.

**Góðkenning av leikvøllinum Sarpugerði í Gøtu.**

Fótbóltssamband Føroya hevur framt eftirlitssýn av nýggja graslíkinum í Sarpugerði í Gøtu til tess, at staðfesta um vøllurin lýkur ásettu treytirnar í Vallarreglugerð FSF´s viðvíkjandi mátum, og um vøllurin annars lýkur FIFA ásett krøv til mát í Fótbóltslógini (*"Laws of the Game"* hjá IFAB: *The International Football Association Board*).

Eftirlitssýnið varð framt 19. august 2021 – tilstaðar vóru vegna FSF: Lassin Isaksen, dómaraleiðari, og Ingi Arge.

Sýnsfólkini frá FSF høvdu fylgjandi viðmerkingar í samband við sýnið:

Mátini á leikvøllinum lúka yvirskipað treytirnar, tó at fylgjandi smærri frávik vórðu staðfest:

*Brotsteigurin (16m) og málteigurin (5m) í eystaru síðu til høgru fyri málið, um mann stendur á mállinjuni og hyggur út á vøllin, tvs. á síðuni móti Víkinga húsinum, avstandurin stendur ikki 100% mát:*

a) Brotsteigurin (innara síða av málstong og til uttara part av linjuni) er 16,45m - skal vera 16,5m.
b) Málteigurin (innara síða av málstong og til uttara part av linjuni) er 5,45m – skal vera 5,50m.

**Niðurstøða:**

FSF skal við hesum boða frá, at leikvøllurin *í Sarpugerði í Gøtu* er góðkendur at nýta í øllum deildum í føroysku lands- og steypakappingini í fótbólti.

Góðkenningin er givin við tí treyt, at leikvøllurin til eina og hvørja tíð lýkur ásettar treytir til leikvøll sambært rundskrivi frá FSF um treytir til leikvøll (Vallarreglugerð 2021).

Samstundis skal verða sagt frá, at FSF við heimild í § 4 í omanfyri nevnda rundskrivi kann fremja sýn/umsýn av leikvøllinum, og taka aftur góðkenningina um leikvøllurin ikki longur lýkur ásettar treytir.

Vinaliga

___________________________________________


**Ronnie Háfoss**
Legal- and Licensing Director & Integrity Officer

**FAROE ISLANDS FOOTBALL ASSOCIATION**
Tórsvøllur / Box 3028 / 110 Tórshavn / Faroe Islands

Tel: +298 291974
E-mail: ronnie@football.fo
Website: www.football.fo
Dátuverndarpolitikkur